# Uttanríkis- og mentamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 7. januar 2020 |
| Mál nr.: | 19/00463 |
| Málsviðgjørt: | TH/JTN |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/201x: doping og óreiðiligari ávirkan í ítrótti**

## Uppskot til

## Løgtingslóg
## um
## doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti

*Allýsing av doping*

**§ 1.** Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, hvørji evni og hvørjar atferðir verða at rokna sum doping sambært hesi løgtingslóg.

*Dopingeftirlit*

**§ 2.** Landsstýrismaðurin góðkennir felagsskap at hava eftirlit við og arbeiða fyri, at doping ikki fer fram í skipaðum føroyskum ítrótti.
*Stk. 2.* Góðkenningin er galdandi í fimm álmanakkaár í senn, og er treytað av, at felagsskapurin alla tíðina røkir tær uppgávur, ið eru álagdar sbrt. hesi løgtingslóg, lýkur krøvini í løgtingslógini og lýkur tær treytir, ið landsstýrismaðurin hevur ásett í sjálvari góðkenningini.
*Stk. 3.* Dopingeftirlitsvirksemið skal skipanarliga vera atskilt frá øðrum virksemi hjá felagsskapinum. Skipanarligu viðurskiftini skulu ásetast í viðtøkunum hjá felagsskapinum.
**§ 3.** Uppgávurnar hjá felagskapi, ið er góðkendur sbrt. § 1, stk. 1, eru at:
1) taka dopingroyndir av ítróttafólki í Føroyum,
2) melda og leggja fram mál um doping,
3) kunna um doping,
4) luttaka í altjóða arbeiði at fyribyrgja doping og
5) ráðgeva og kunna almennar myndugleikar um viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri arbeiði at fyribyrgja doping.

*Stk. 2.* Fyri at røkja uppgávurnar, ið eru álagdar sbrt. stk. 1., kann felagsskapurin samstarva við líknandi felagsskapir og myndugleikar í øðrum londum.

*Fyribyrging av doping í venjingarmiðstøðum*

**§ 4.** Felagsskapur, ið er góðkendur sbrt. § 2, stk. 1, skal arbeiða fyri at gera avtalur um dopingeftirlit við venjingarmiðstøðir og onnur, ið fáast við ítróttaligt virksemi, ella líknandi virksemi, ið ikki er umfatað av § 2, stk. 1, um skipaðan føroyskan ítrótt.
*Stk. 2.* Ein venjingarmiðstøð sbrt. hesi løgtingslóg er eitt stað, har vinnurekandi bjóðar skipaða venjing ella atgongd til venjingarútgerð móti viðurlagi.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um innihaldið í avtalu sbrt. stk. 1.

**§ 5.** Venjingarmiðstøðir skulu kunna um, hvørt tær hava gjørt samstarvsavtalu við felagsskap, sbrt. § 2.
*Stk. 2.* Kunning sbrt. stk. 1 skal verða skrivað á skelti, ið verður hongt upp á sjónligum staði við inngongdina til venjingarmiðstøðina. Hevur venjingarmiðstøðin eina heimasíðu, skal kunningin eisini vera á sjónligum stað á heimasíðuni.
*Stk 3.* Felagsskapurin sbrt. § 2 ger nærri reglur um skelting og kunning. Landsstýrismaðurin skal góðkenna reglurnar.
*Stk. 4.* Brot á stk. 1 verður revsað við sekt. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Talgild skrá yvir dopingdømd*

**§ 6.** Felagsskapur, ið er góðkendur sbrt. § 2 at fremja dopingeftirlit, skal skipa fyri, at tey, ið eru dømd til ítróttaliga revsing fyri brot á dopingreglurnar, verða skrásett í talgilda skrá. Í skránni skal verða skrásett navn, føðingardagur og bústaður hjá viðkomandi, dagfesting fyri dopingdómin, og nær dómurin fer úr gildi.
*Stk. 2.* Felagsskapurin kann lata upplýsingar um, hvør hevur fingið ítróttaligan dóm til onnur úr talgildu skránni, tá hetta er neyðugt til tess at handhevja ein slíkan dóm. Upplýsingarnar kunnu bert umfata navnið hjá viðkomandi, dagfestingina á dóminum, og nær dómurin fer úr gildi. Upplýsingarnar kunnu bert nýtast til at handhevja ítróttalig revsiátøk fyri brot á dopingreglurnar.
*Stk. 3.* Tey, ið hava atgongd til tær í stk. 1 nevndu upplýsingar ella fáa tær útflýggjaðar sbrt. stk. 2, eru umfatað av reglunum um tagnarskyldu í revsilógini.
*Stk. 4.* Felagsskapurin kann samstarva við líknandi felagsskapir og myndugleikar í øðrum londum um stovnan og røkt av talgildu skránni ella um, at felagsskapurin brúkar skránna hjá líknandi felagsskapi ella myndugleika í útlandinum. Landsstýrismaðurin skal góðkenna eitt slíkt samstarv.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu skráin skal skipast og umsitast.

*Fyribyrging av óreiðiligari ávirkan á ítróttakappingar*

**§ 7.** Tann, ið tilætlað og av órøttum veitir, lovar ella bjóðar persóni, ið tekur lut í ella røkir eina uppgávu í sambandi við ítróttakapping á høgum stigi her í landinum ella í útlandinum, eina gávu ella annan fyrimun, fyri at fáa hann til at gera ella at lata vera við at gera okkurt, ið kann fáa ávirkan á ítróttakappingina, verður revsaður við sekt ella fongsul í upp til eitt ár, um gerðin ikki kemur undir § 279 í revsilógini.
*Stk 2.* Á sama hátt verður tann, ið tekur lut í ella røkir eina uppgávu í sambandi við ítróttakapping, revsaður, sum tilætlað og av órøttum tekur ímóti, biður um ella letur sær lova gávu ella annan fyrimun afturfyri at gera ella at lata vera við at gera okkurt, ið kann fáa ávirkan á ítróttakappingina, um gerðin ikki kemur undir § 279 í revsilógini.
*Stk. 3.* Revsingin kann vaksa til fongsul í upp til 2 ár, um talan er um grov brot, serstakliga orsakað av útinningarháttinum, ella tí at fleiri eru saman um tey, ella sum fylgja av vavinum av áðurnevndu gávu ella fyrimuni.

**§ 8.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Dopingevni, og atferðir ið stimbra avrik í ítrótti, skaða etisku virðini í ítróttinum og skeikla kappingina og grundreglurnar um, at øll eru líka stillað í sambandi við luttøku í ítróttakappingum. Harafturat kann tað vera vandamikið fyri heilsuna hjá tí einstaka at nýta dopingevni ella at nýta atferðir, ið eru stimbrandi.

Trupulleikin við doping finst ikki einans í kappingaítrótti, men eisini í øðrum umhvørvum, sum ofta nýta privatar venjingarmiðstøðir at venja í.

Umframt doping, kann tað eisini gera skaða á ítróttin, at ítróttafólk o.o. verða ávirkað av fyrilitum, ið onki hava við sjálvan ítróttin at gera. Ítøkiliga verður hugsað um, at eitt ítróttafólk, ella annar persónur, ið fæst við ítrótt, fær lyfti um fíggjarligan fyrimun afturfyri at virka fyri einum ávísum úrsliti – so-nevnd "matchfixing".

Landsstýrið ynskir at arbeiða fyri, at føroyskur ítróttur ikki verður ávirkaður av doping og øðrum óreiðiligum atburði. Viðmerkjast skal eisini, at tað er ein treyt fyri føroyskum limaskapi í IOC, at Føroyar liva upp til tær treytir, sum IOC setir til dopingeftirlit o.l.

Orsøkin til at málið verður tikið upp nú er, at Dátueftirlitið hevur boðað ÍSF frá, at lógarheimild skal til at viðgera tær persónsupplýsingar, sum koma burtur úr dopingroyndum í Føroyum.

*Antidoping*
Antidopingarbeiðið í Føroyum byrjaði í 2003, tá Dansk Idrætsforbund og Ítróttasamband Føroya gjørdu fyrstu samstarvsavtaluna um antidopingarbeiði í Føroyum. Fyrstu royndirnar av føroyskum ítróttafólkum vóru eisini tiknar hetta ári. Frá 2003 til 2016 var dopingarbeiðið stýrt eftir donsku reglugerðini, sum var umsett til føroyskt.

Í 2005 var Antidoping Danmark stovnað sum ein sjálvstøðugur stovnur undir Kulturministeriet.

Í 2016 fekk ÍSF sína egnu dopingreglugerð, og er alt dopingarbeiði í dag stýrt sambært henni.

Til 2017 stóð Antidoping Danmark fyri royndunum í Føroyum. Eitt dopingeftirlitsfólk frá Antidoping Dammark kom til Føroya eina til tvær ferðir um árið og hevði viðkomandi ábyrgdina av dopingroyndunum.

Í 2017 fingu føroysk ítróttafólk síni egnu dopingeftirlitsfólk. Fimm dopingeftirlitsfólk eru nú góðkend, og eru hesi skúlað ígjøgnum eina útbúgvingarskipan hjá Antidoping Danmark. Hetta ger, at vit í Føroyum nú sjálvi standa fyri øllum tí praktiska arbeiðinum hesum viðvíkjandi. Tað er tí ikki longur neyðugt at fáa fólk frá Antidoping Danmark til Føroya at hava ábyrgdina av dopingroyndunum. Hetta ger tað eisini gjørligt at taka royndir fleiri ferðir um árið ístaðin fyri bert eina ella tvær ferðir.

Í 2018 gjørdu fyrstu venjingarmiðstøðirnar í Føroyum eina samstarvsavtalu við Antidoping Danmark. Mett verður, at hetta var eitt stórt fet hjá okkum í stríðnum ímóti doping. Í dag hava so gott sum allar venjingarmiðstøðir í Føroyum gjørt samstarvsavtalu við Antidoping Danmark.

Samstarvsavtalan er við Antidoping Danmark, men tað eru føroysku eftirlitsfólkini, sum útinna hetta arbeiði.

Hóast antidopingarbeiðið hevur nógv ár á baki, so hevur alt arbeiðið verði gjørt uttan at nøkur lóggáva hevur verið galdandi á økinum. Tað hevur m.a. gjørt, at rættarstøðan viðvíkjandi eitt nú viðgerð av persónsupplýsingum hevur verið ógreið.

Á vári 2019 gjørdi Dátueftirlitið ÍSF greitt, at man metti, at tað var ógvuliga ivasamt, um heimild var at gera dopingroyndir í Føroyum. Orsøkin var, at viðgerðin av dopingroyndunum verður mett at vera viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum, og at henda viðgerðin helst kravdi lógarheimild.

ÍSF setti seg í samband við táverandi Mentamálaráðið og vísti á, at tað var av alstórum týdningi, at tey formligu viðurskiftini vóru fingin í rættlag, tí at tað kundi fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri føroyska luttøku í altjóða ítrótti, um dopingroyndir ikki longur kundu takast í Føroyum. Eftir at ráðið hevði umrøtt málið á fundi saman við Dátueftirlitinum og ÍSF, var avgjørt at ráðið skuldi fyrireika eitt uppskot til løgtingslóg, ið hevði til endamáls at fáa formligu viðurskiftini í rættlag. Samstundis var eisini avgjørt, at til uppskotið er samtykt og sett í gildi verða ikki fleiri dopingroyndir gjørdar í Føroyum.

Ætlanin við hesum løgtingslógaruppskoti er tí at fáa til vega neyðugu heimildina til, at landsstýrismaðurin við ítróttamálum kann góðkenna ein felagsskap at fremja dopingeftirlit í Føroyum. Tað er ikki ætlanin at broyta verandi skipan, og tað liggur í kortunum, at tað framhaldandi verður ÍSF, ið tekur sær av anti-doping arbeiðinum í Føroyum.

*Fyribyrging av óreiðiligari ávirkan á ítróttakappingar*
Á vári 2015 samtykti danska fólkatingið lóg um broyting í táverandi *lov om dopingfri idrætt*. Lógin broytti navn til *lov om fremme af integriet i idrætten*, og ásetti reglur, ið skulu fyribyrgja óreiðiligari ávirkan á ítróttakappingar. Millum annað varð mutur innan ítróttin gjørt revsivert.

Broytingin bygdi á tilmælið frá *"Arbejdsgruppen om regulering af matchfixing"*. Viðvíkjandi "matchfixing" skrivaði arbeiðsbólkurin á síðu 85 í frágreiðingini:

"*Bestikkelse inden for idrætten*
*Visse handlinger forundet med matchfixing er efter omstændighederne strafbare. Straffelovens bestemmelser om bedrageri, vold, tvang, trusler jf. afsnit 5.2, kan finde anvendelse når overtrædelserne sker i regi af idrætten.*

*Som beskrevet i kapitel 5. er bestikkelse inden for idrætten reguleret i DIF's matchfixinglovregulativ, men er ikke strafbart, som det eksempelvis efter omstændighederne er tilfældet i Norge, Sverige og Finland.*

*Arbejdsgruppen finder, at der bør tages politisk stilling til, om bestikkelse inden for idrættens verden, og hvor forholdet ikke er omfattet af bedrageribestemmelsen eller andre bestemmelser i straffeloven, bør kriminaliseres.*

*Arbejdsgruppen har overvejet, om der kan være situationer, hvor bestikkelse inden for idrætten burde være kriminaliseret.*

*Arbejdsgruppen vurderer, at der kan opstå situationer, hvor en person uden for idrættens verden, der er involveret i matchfixing – uden selv at have et økonomisk motiv – bestikker en person til at opnå et bestemt resultat, og hvor de nuværende straffebestemmelser ikke kan finde anvendelse, ligesom idrættens regler heller ikke finder anvendelse, eftersom forholdet omfatter personer uden tilknyting til idrætten.*

*Som eksempler på sådanne tilfælde, hvor det kan være relevant at vurdere behovet for en særskilt strafferetlig regulering af bestikkelse inden for idræt, kan nævnes bestikkelse af en dommer eller modstanderholdet i en konkurrence, hvori der deltager professionelle udøvere. Det kan eksempelvis være i en slutspilskamp om op- eller nedrykning eller i en pokalfinale. Arbejdsruppen finder, at dette taler for at indføre en bestemmelse, der kriminaliserer bestikkelse inden for idræt.*

*De skal bemærkes, at arbejdsgruppen ikke har idenficeret konkrete matchfixingsager, hvor det var et problem, at bestikkelse inden for idrætten ikke er selvstændigt kriminaliseret.*

*Arbejdsgruppens anbefaling*
*Arbejdsgruppen anbefaler, at grovere tilfælde af bestikkelse inden for idrætten kriminaliseres. Arbejdsgruppen lægger vægt på, at alle situationer forbundet med bestikkelse inden for idrætten i princippet bør være omfattet af strafferetlige regler, således at der efter omstændighederne kan føres straffesag mod personer involveret i bestikkelse inden for idrætten. Arbejdsgruppen understreger, at idrætten i store dele er finanisieret af offentlige midler, og at staten bør have en interesse i at understøtte kampen mod matchfixing.*

*Envidere bemærker arbejdsgruppen, at en kriminalisering af bestikkelse inden for idrætten i sig selv kan have en præventiv effekt.*

*En kriminalisering af bestikkelse inden for idrætten bør omfatte såvel udøvere, dommere, officials og hjælpepersonale som ledere af idrætsorganisationer herunder også administrative og politisk valgte ledere.*

*En straffebestemmelse kan gennemføres som en særbestemmelse i enten en ny lov om bekæmpelse af matchfixing under Kulturministeriet eller ved en ændring af f.eks. lov om fremme af dopingfri idræt, således at den får et bredere formål til også at dække andre etiske områder, der udgør trusler for idrættens integritet.“*

Hóast Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki er vitandi um, at matchfixing er ein trupulleiki í føroyskum ítrótti enn, so verður mett, at tað er neyðugt at áseta reglar hesum viðvíkjandi kortini. Ítróttaheimurin er sera alheimsgjørdur, og føroysk ítróttafólk luttaka í alsamt størri mun í altjóða kappingum, eins og mongdin av pengum innan ítróttin eisini økist í hvørjum. Hildið verður tí, at rættast er at seta í gildi reglur, ið fyribyrgja matchfixing í føroyskum ítrótti.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Tað er eingin lóggáva galdandi um dopingeftirlit í Føroyum. Í 2004 var sett í gildi løgtingslóg nr. 85 frá 20. desember 2004 um forboð móti ávísum dopingevnum, ið ger tað revsivert at framleiða, flyta inn, flyta út, selja, útflýggja, býta út ella liggja inni við ávísum dopingevnum. Løgtingslógin snýr seg tískil um forboð móti sjálvum dopingevnunum og ikki um tað at dopa seg. Hetta lógaruppskotið snýr seg hinvegin um at geva heimild til at gera dopingroyndir av teimum, ið íðka ítrótt, soleiðis at tey, ið dopa seg, kunnu fáa ta ítróttaligu revsing, ið

ítróttaheimurin sjálvur hevur ásett. Hinvegin verður ikki ásett nøkur revsirættarlig fylgja av at verða fangaður við dopingevni í blóðinum – talan er bert um ítróttaligar fylgir.

Sum nevnt undir "Orsakir til uppskotið", so hevur ÍSF havt dopingeftirlit í samstarvi við Antidoping Danmark. Lógargrundarlagið undir Antidoping Danmark er Lovbekendtgørelse nr. 1168 af 7. okt. 2015 om fremme af integritet i idrætten.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, ÍSF kann halda fram við sínum anti-doping arbeiði, soleiðis at nøktandi dopingeftirlit kann verða framt í Føroyum. Innan ítróttaheimin er talan um sera týðandi arbeiði, ið tryggjar, at føroyskur ítróttur heldur tær reglur, og livir upp til tey krøv, ið altjóða ítróttasamfelagið setur. Harumframt er endamálið at heimila, at óreiðilig ávirkan á ítróttin – so nevnd "matchfixing" – kann fáa revsirættarligar fylgir.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Við hesi løgtingslóg verður gjørligt at góðkenna eitt føroyskt dopingeftirlit. Sum nevnt áður, hevur Antidoping Danmark í samstarvi við ÍSF framt hetta eftirlit. Mett verður, at tað er ein fyrimunur fyri Føroyar at hava egið regluverk um dopingeftirlit og fyribyrging av matchfixing, av tí at tað er sera umráðandi fyri føroyskan ítrótt, at hesi viðurskifti eru í lagi og liva upp til altjóða krøv. Ætlanin er, at tað framhaldandi verður ÍSF, ið fer at fremja hetta eftirlit.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið verður sent til:

Løgmansskrivstovuna
Heilsumálaráðið
Fíggjarmálaráðið
Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Almannamálaráðið
Fiskimálaráðið
Dátueftirlitið
Føroya Landfúta
Ríkisumboðið
Ítróttasamband Føroya
Hugaítróttur Føroya
Antidoping Danmark
Vinnuhúsið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið sjálvt hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur. Í dag hevur ÍSF dopingeftirlit um hendi. Í sambandi við arbeiði við at gera lógaruppskotið hevur nógv samskifti verið við ÍSF, tí at ætlanin er, at tað framhaldandi verður ÍSF, ið fer at taka sær av antidopingarbeiðinum. ÍSF hevur boðað frá, at teirra meting er, at eitt nøktandi dopingeftirlit kostar áleið 500.000 kr. um árið. Henda upphæddin umfatar løn til eftirlitisfólk, ið taka dopingroyndir, viðgerð av dopingroyndum á ransóknarstovum, skeið til eftirlitsfólk, altjóða samstarv o.l.

ÍSF hevur borið hesar útreiðslur við tí stuðulsjáttan, sum felagið longu fær á fíggjarlógini, men hevur sett fram ynski um, at ein atskild stuðulsjáttan verður gjørd til anti-doping arbeiðið, og at ein slík játtan ikki ávirkar tann stuðul, ið ÍSF annars fær.

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 bað Uttanríkis- og mentamálaráðið Løgtingið um at hækka stuðulin til ÍSF við 500.000 kr. Henda umbøn var gingin á møti.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur onga ávirkan á kommunurnar. Fyri landið merkir uppskotið, at landsstýrismaðurin við ítróttamálum skal góðkenna ein felagsskap at hava dopingeftirlit, og hava eftirlit við góðkenda felagsskapinum. Hetta krevur nakað av málsviðgerð, men mett verður ikki, at uppskotið sum heild hevur stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Í *§ 4* áleggur uppskotið felagsskapinum, ið er góðkendur sbrt. *§ 2* at arbeiða fyri at gera avtalur við venjingarmiðstøðir í Føroyum. Endamálið við hesum avtalum er, at felgasskapurin eisini skal taka dopingroyndir á føroysku venjingarmiðstøðunum. Í *§ 5* er ásett, at venjingarmiðstøðir skulu veita kundum sínum kunning, um tær hava gjørt slíka avtalu ella ikki. Ein venjingarmiðstøð, ið ikki veitir hesa kunning, kann verða dømd at rinda sekt.

Hinvegin, so verður mett, at venjingarmiðstøðir kunnu nýta hetta í sínum virksemi, við at marknaðarføra seg sum dopingfrítt umhvørvi. Talan er tí um eina jaliga avleiðing.

Hugsandi er eisini, at eftirlitsfelagsskapurin fer at taka eitt gjald fyri at gera dopingeftirlit á teimum venjingarmiðstøðum, ið gera avtalu við felagsskapin. Hetta er tó ein avtalurættarligur spurningur, ið partarnir avgreiða sínámillum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur til endamáls at tryggja, at føroyskur ítróttur fer fram uttan at verða ávirkaður av doping ella “matchfixing”. Uppskotið hevur onga ávirkan á umhvørvið ella náttúruna í Føroyum.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk økir í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur avleiðingar fyri føroyskar ítróttafelagsskapir og føroyskan ítrótt sum heild. Millum annað fer uppskotið at tryggja, at føroysk ítróttafólk lógliga kunnu taka dopingroyndir, og fer soleiðis at verða við til at fyribyrgja, at føroysk ítróttafólk dopa seg.

Harumframt fer uppskotið at verja ítróttin móti óreiðiligari ávirkan við at gera tað møguligt at revsa bæði tey, ið royna at mutra ítróttafólk ella onnur, og tey ítróttafólkini, ið lata seg mutra.

Samanumtikið verður tí mett, at uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri ítróttin og føroyskar ítróttafelagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Danmark hevur skrivað undir og sett í gildi altjóða sáttmálan móti doping hjá UNESCO. Sáttmálin bindur heimsins lond til at vera partur av og fíggja World Anti-Doping Agency (WADA). Undirskriftin umfatar tó bert Danmark og ikki Føroyar og Grønland.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Mett verður ikki, at sáttmálin er viðkomandi fyri uppskotið

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær marknaðarforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Í *§ 5, stk. 1* verður álagt venjingarmiðstøðum at veita kundum sínum kunning um, hvørt venjingarmiðstøðin hevur avtalu um dopingeftirlit við góðkendan eftirlitsfelagsskap. Í *stk 5* er ásett, at brot á *stk. 1* verður revsað við sekt.

Í *§7, stk. 1 og* 2 ger lógaruppskotið tað revsivert at mutra tey, ið á ein hvønn hátt taka lut í eini ítróttakapping, eins og lógaruppskotið ger tað revsivert hjá teimum, ið taka lut í kappingini, at taka ímóti mutri. Í báðum førum kann revsingin verða sekt ella fongsul upp í eitt ár. Í *stk. 3* er ásett, at í serliga álvarsligum førum kann revsingin hækka upp í 2 ára fongsulsrevsing.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur venjingarmiðstøðum at kunna sínar kundar um, hvørt venjingarmiðstøðin hevur gjørt avtalu við góðkendan eftirlitsfelagsskap. Sambært lógini skal ein venjingarmiðstøð skelta við hesi kunning á sjónligum stað í hølum sínum og á heimasíðuni.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í *§ 1* verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um, hvørji evni, og hvørjar atferðir verða at rokna sum doping.

Sambært *§ 2, stk. 1* góðkennir landsstýrismaðurin felagsskap at hava eftirlit við og arbeiða fyri, at doping ikki fer fram í føroyskum ítrótti.

Í *§ 5, stk. 3* er ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna tær reglur um skelting og kunning, ið eftirlitsfelagsskapurin ger í sambandi við dopingeftirlit á venjingarmiðstøðum.

Í *§ 6, stk. 4* er ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna, at felagsskapur, ið er góðkendur sbrt. *§ 2, stk. 1,* samstarvar við líknandi felagskap, ella myndugleika í útlandinum um skipan av talgildari skrá yvir dopingdømd.

Í *§ 6, stk. 5* er ásett, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu talgilda skráin skal skipast og umsitast.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Løgtingslógaruppskotið gevur ikki almennu myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
**Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at gera av, hvat er umfatað av doping-hugtakinum í lógini.**

World Anti Doping Agency (WADA) sendir á hvørjum ári út ein lista við ólógligum dopingevnum og atferðum, sbrt. World Anti Doping Code. Ætlanin er at brúka henda listan til at avmarka, hvørji dopingevni og atferðir verða at rokna sum doping. Dømi um, hvørjar atferðir kunnu roknast sum doping kann vera eitt nú blóðdoping ella snýt við dopingroyndum. Eitt dømi um snýt við dopingroyndum er at taka reint land og spræna upp í vatnræsi, áðrenn dopingroyndin verður tikin.

**Til § 2**
Eftir *§ 2, stk. 1,* verður landsstýrismaðurin heimilaður at góðkenna felagsskap at hava eftirlit við, at doping ikki fer fram í føroyskum ítrótti. Hugtakið "Føroyskur ítróttur" sambært hesi løgtingslóg er allur ítróttur, ið hoyrir undir virksemið hjá Ítróttasambandi Føroya. Higartil hevur ÍSF saman við Antidoping Danmark staðið fyri at fremja dopingroyndir í Føroyum.

Eftirlitið sbrt. § 2 kann tó víðkast til at umfata annan ítrótt og líknandi virksemi, sum í dag ikki hoyrir undir ÍSF. Sí viðmerkingarnar til *§ 4, stk. 1.*

Loysnin í § 2, stk. 1, líkist heldur loysnini í Íslandi enn í Danmark. Í Danmark varð Antidoping Danmark sett á stovn í 2005 sum ein sjálvstøðugur stovnur, fevndur av almennu fyrisitingini og tískil eisini bundin av eitt nú innlitslógini og fyrisitingarlógini. Vit hava ongan slíkan stovn í Føroyum í dag. Í Íslandi er ein líknandi áseting í ítróttalógini, og hevur íslendska mentamálaráðið gjørt sáttmála við Íþrótta- og Ólympíusamband Íslands (ÍSÍ), soleiðis at hesin felagsskapurin fremur eftirlitið á økinum.

Virksemi hjá ÍSF er ikki fevnt av ásetingunum í innlitslógini og fyrisitingarlógini.

Í *§ 2, stk. 2,* verður mælt til, at góðkenningin eftir stk. 1 er galdandi í fimm ár. Tað er umráðandi, at felagsskapurin, sum kemur at fremja dopingeftirlit í Føroyum, lýkur treytirnar, sum verða settar til slíkan eftirlitsmyndugleika. Eftirlitsmyndugleikin skal eitt nú lúka treytir og krøv, sum verða sett í lógini, sbrt. kunngerð og góðkenningini frá landsstýrismanninum. Harafturat skal eftirlitsmyndugleikin lúka treytir og krøv, sum WADA setur til eitt dopingeftirlit.

Í *§ 2, stk. 3,* verður mælt til at áseta, at dopingeftirlitsvirksemið verður atskilt skipanarliga frá øðrum virksemi hjá felagsskapinum. Tað er umráðandi, at dopingeftirlitið ikki rekur virksemi, sum hevur vinning fyri eyga, og at dopingeftirlitsvirksemi hjá felagsskapinum ikki er tengt at áhugamálum, sum kunnu seta arbeiðið hjá eftirlitsmyndugleikanum í eina støðu, sum kann skala trúvirði hjá dopingareftirlitinum. Altjóða rákið í stríðnum ímóti doping í ítrótti er, at skipanin við dopingeftirliti liggur hjá einum óheftum stovni, sum ikki umboðar áhugamál ella partar innan ítróttin. Mett verður ikki, at slíkur stovnur finst í Føroyum í dag, og sum hevur neyðugu førleikar, men um eitt nú ÍSF framhaldandi verður tann myndugleikin, sum kemur at verða dopingeftirlit, so er tað umráðandi, at parturin viðvíkjandi dopingvirkseminum verður skildur sundur frá øðrum virksemi hjá ÍSF.

**Til § 3**
Í *§ 3, stk. 1*, eru uppgávurnar hjá felagsskapinum ásettar.

Eftir *§ 3, stk. 1, nr. 1*, verður mælt til, at dopingeftirlitið skal taka dopingroyndir av ítróttafólki í Føroyum. Meginparturin av hesum arbeiði er at taka land- og blóðroyndir. Eftirlitið fevnir eisini um alt kanningar- og viðgerðararbeiðið frá tí at land- og blóðroyndirnar eru tiknar til málið møguliga verður meldað og lagt fram fyri rætta ítróttamyndugleika. Eitt nú skal dopingeftirlitið fáa til vega og viðgera allar neyðugar upplýsingar um málið, soleiðis at støða kann takast til, um málið skal leggjast fram og meldast. Mett verður, at tað hvørki í góðsku ella fíggjarliga loysir seg, at dopingeftirlitið sjálvt skipar fyri kanningum av land- og blóðroyndum, men at hesar verða sendar til eina WADA góðkenda kanningarstovu, ella eina kanningarstovu, sum lýkur treytirnar hjá WADA. Hesar royndir verða í dag viðgjørdar á góðkendari kanningarstovu í Noregi.

Felagsskapurin, sum kemur at taka sær av dopingeftirlitinum, fer at taka dopingroyndir av ítróttafólki í Føroyum. Ein partur av hesi uppgávu er eisini at viðgera upplýsingar, sum standast av royndunum. Upplýsingarnir kunnu vera vanligar upplýsingar, ið ikki eru viðkvæmar, upplýsingar viðvíkjandi heilsustøðu og upplýsingar um aðrar privatar upplýsingar, sum eru fevndar av løgtingslóg nr. 73 frá 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, hereftir nevnd persónsupplýsingarlógin. Tað er undirskilt í ásetingini, at dopingeftirlitið hevur heimild til at viðgera teir persónligu upplýsingarnar, sum standast av dopingroyndunum og tí kanningararbeiði, sum krevst av dopingarbeiðinum. Í sambandi við at dopingroyndir verða tiknar samlar felagsskapurin, sum hevur dopingeftirlitið um hendi, samleikaprógv og upplýsingar um møguligt brúk av heilivági. Eitt dømi um eitt evni, sum er á dopinglistanum, men sum nógv hava tørv á, er heilivágur fyri hoyfepur. Tá ið felagsskapurin, sum hevur eftirlit um hendi, skal gera av, um málið skal meldast og leggjast fram sum eitt ítróttamál, er neyðugt, at felagsskapurin hevur neyðugar upplýsingar til at kunna gera sær eina meting av málinum. Summi ítróttafólk hava fingið undantak til ávísan heilivág, um hetta er neyðugt vegna sjúku ella líknandi. Slíkar upplýsingar eru viðkvæmar persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini.

Í § 10, stk. 1, nr. 5 í persónsupplýsingarlógini er ásett, at viðkvæmar upplýsingar kunnu viðgerast, um viðgerðin er neyðug, fyri at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast. Mett verður, at heimildin hjá felagsskapinum at viðgera slíkar viðkvæmar upplýsingar er undirskilt, tá ið ásett er, at felagsskapurin skal taka dopingroyndir sbrt. § 3, stk. 1, nr. 1.

Eftir *§ 3, stk. 1, nr. 2*, verður tað felagsskapurin, sum hevur eftirlit sbrt. § 2, stk. 1, sum tekur støðu til, um eitt mál skal meldast til rætta myndugleika innan ítróttin, sambært reglunum hjá ÍSF. Harafturat er tað dopingeftirlitið, sum flytur málið fyri rætta myndugleikan innan ítróttin. Í dag hevði rætti myndugleiki verið dopingnevndin hjá ÍSF. Tann, sum verður ákærdur, felagsskapurin sbrt. § 2, stk. 1, avvarðandi sersamband og altjóðasamband, kann kæra eina avgerð hjá dopingnevndini til Ítróttadómstólin sbrt. dopingreglugerðini hjá ÍSF.

Arbeiðið hjá eftirlitsmyndugleikanum fevnir eisini um kunning, sbrt. *§ 3, stk. 1, nr. 3.* Kunningin kann eitt nú fevna um at útvega tilfar til undirvísing, at upplýsa um doping á heimasíðu, at skipa fyri fyrilestrum o.tíl.

Eftir *§ 3, stk. 1, nr. 4*, verður ein uppgáva hjá felagsskapinum at luttaka í altjóða arbeiði at fyribyrgja doping.

Sambært *§ 3, stk. 1, nr. 5,* fevnir virksemi hjá felagsskapinum, sum hevur dopingeftirlitið um hendi, um at ráðgeva og kunna almennar myndugleikar um viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri arbeiðið at fyribyrgja doping. Millum annað fevnir henda uppgávan um at ráðgeva landsstýrismanninum í politiskum spurningum viðvíkjandi doping og í sambandi við altjóða arbeiðið hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi doping.

Í *§ 3, stk. 2* verður ásett, at felagsskapurin, sum hevur dopingeftirlitið um hendi, kann gera avtalur við líknandi felagsskapir og myndugleikar í øðrum londum. Higartil hevur Antidoping Danmark staðið fyri dopingeftirlitinum í Føroyum saman við ÍSF. Við hesum kann felagsskapurin samstarva við eitt nú Antidoping Danmark um at røkja tær uppgávur, sum eru nevndar í stk. 1 í tann mun tað er neyðugt.

**Til § 4**
Orsøkin til ásetingina í *§ 4, stk. 1,* er, at trupulleikin við doping, eisini finst uttan fyri úrvalsítrótt. Til tess at fyribyrgja, at doping gerst ein trupulleiki í eitt nú føroyskum venjingarmiðstøðum, verður mælt til, at felagsskapurin, sum hevur dopingeftirlitið um hendi, fær heimild til at gera avtalur við eitt nú venjingarmiðstøðir, um at hesar verða fevndar av dopingeftirlitinum hjá felagsskapinum.

Tær venjingarmiðstøðir, sum gera avtalu hesum viðvíkjandi, fáa møguleika at marknaðarføra seg sum eitt dopingfrítt umhvørvi. Ein slík avtala hevur við sær, at dopingroyndir kunnu verða gjørdar í viðkomandi venjingarmiðstøðum, og tískil er tað ein treyt, at venjingarmiðstøðin í sáttmálum við limirnar kunnar um, at dopingroyndir kunnu verða framdar. Harafturat verður neyðugt, at sáttmálarnir greitt tilskila, hvørja avleiðing tað kann fáa, um kundarnir antin sýta fyri at stilla upp til dopingroynd ella um úrslitið av dopingroynd er positivt. Avleiðingin av hesum kann verða, at limir verða burturvístir ella fáa karantenu frá venjingarmiðstøðini.

Í dag hava nærum allar venjingarmiðstøðirnar í Føroyum gjørt slíkar avtalur við Antidoping Danmark. Tá ið henda lógin kemur í gildi, verður neyðugt, at avtalurnar við Antidoping Danmark verða avloystar við avtalum við felagsskapin, sum hevur dopingeftirlitið í Føroyum um hendi.

Tað er eisini møguligt hjá fyriskiparum av ítróttakappingum, sum annars ikki eru fevnd av lógini, at gera eina avtalu við felagsskapin, sum hevur dopingeftirlitið um hendi, soleiðis at hesar kappingar eisini eru fevndar av dopingeftirlitinum hjá felagsskapinum. Tað kann eisini hugsast, at avtala verður gjørd við aðrar felagsskapir, sum annars ikki eru fevndir av Ítróttasambandi Føroya. Eitt nú kundi ein slík avtala verði gjørd við Hugaítrótt Føroya, soleiðis at dopingeftirlitið eisini kemur at fevna um virksemi hjá Talvsambandi Føroya og Føroya Bridgesambandi. Slíkar avtalur skulu binda hesi sambond til at fylgja teimum leiðreglum og revsiátøkum, sum eru galdandi innan fyri øki hjá ÍSF.

*§ 4, stk. 2,* er ein allýsing av hugtakinum venjingarmiðstøð. Eitt, sum eyðkennir eina venjingarmiðstøð, er, at ein og hvør kann tekna seg sum lim og brúka teir hentleikar, sum eru á staðnum. Sambært ásetingini skal talan vera um eina venjingarmiðstøð, sum er vinnurekandi. Hetta merkir, at ásetingar hesum viðvíkjandi ikki eru galdandi fyri eitt nú venjingarstøð á sjúkrahúsum, stovnum og bústøðum.

*§ 4, stk. 3* heimilar landsstýrismanninum at ásetta nærri reglur um innihaldið í avtaluni millum eftirlitsfelagsskapin og venjingarmiðstøðir. Endamálið er at tryggja, at avtalan er í samsvari

við endamálið við løgtingslógini, og at avtalan ikki leggur óneyðugar byrðar á venjingarmiðstøðirnar.

**Til § 5**
Í *§ 5, stk. 1,* er ásett, at venjingarmiðstøðir skulu kunna um, hvørt tær hava gjørt samstarvsavtalu sbrt. § 4. Venjingarmiðstøðir skulu sostatt ikki bert kunna, um tær hava gjørt eina slíka avtalu, men eisini, um tær ikki hava gjørt slíka avtalu.

Kunningin skal verða bæði fysiskt á staðnum og á heimasíðuni hjá venjingarmiðstøðini sbrt. *§ 5, stk. 2.*

Í *§ 5, stk. 3,* er ásett, at felagsskapurin, sum hevur dopingeftirlitið um hendi, ger nærri reglur um skelting og kunning, og at landsstýrismaðurin skal góðkenna reglurnar.

Í *§ 5, stk. 4,* verður skotið upp, at brot á skylduna at kunna sbrt. stk. 1 verður revsað við sekt.

**Til § 6**
Felagsskapur, ið er góðkendur at fremja dopingeftirlit í Føroyum, skal, sbrt. *§ 6, stk. 1* syrgja fyri, at tey, ið hava fingið eina ítróttaliga revsing fyri dopingnýtslu sbrt. teimum reglum, sum eru galdandi innan ítróttin verða skrásett í talgildari skrá. Skráin skal lúka krøvini í tí til einu og hvørja tíð galdandi lóggávu um verju og viðgerð av persónsupplýsingum.

Í dag er skipanin, at føroysk ítróttafólk, ið fáa ein dopingdóm verða skrásett í altjóða skránni ADAMS, og í skránni hjá Antidoping Danmark. Persónur, ið verður tikin fyri doping á eini venjingarmiðstøð verður bert skrásettur í skránni hjá Antidoping Danmark. Hetta er sama mannagongd, sum verður nýtt í Danmark. Í Føroyum verður mannagongdin helst tann, at persónur, ið verður tikin fyri doping á venjingarmiðstøð bert verður skrásettur í skránni hjá føroyska felagsskapinum.

Í *§ 6 stk. 2.* er ásett, at felagsskapurin kann lata upplýsingar um persónar, ið hava fingið ítróttaliga revsing fyri brot á dopingreglurnar til onnur, tá hetta er neyðugt til at handhevja slíkan dóm. Hetta merkir, at felagsskapurin, ið fremur eftirlit, kann lata upplýsingar til eitt nú sersambondini ella einstøku ítróttafeløgini, um at eitt ávíst ítróttafólk hevur fingið dóm fyri doping. Hetta kann verða neyðugt, um viðkomandi ítróttafólk er útihýst úr ítróttinum í eitt tíðarskeið. Í Danmark er mannagongdin tann, at um eitt ítróttafólk fær ein dopingdóm, verður fráboðan send til ítróttafelagið, har viðkomandi er limur, og til avvarðandi sersamband. Er talan um elitu-ítrótt (t.d. ein súkklara, ið luttekur í Tour de France), verður úrskurðurin eisini almannakunngjørdur í miðlunum.

Í Danmark er skipanin tann, at Antidoping rekur heimasíðuna www.dopingregisteret.dk. Viðkomandi felagsskapir og fyritøkur kunnu síðani søkja um at fáa atgongd til skránna. Skráin virkar eftir “hit/no hit” leistinum. Tað merkir, at man kann bert leita eftir einum ítøkiligum persóni fyri at vita, um viðkomandi stendur í skránni. Neyðugt er, at man er førur fyri at eyðmerkja persónin, eitt nú við CPR-talinum. Tað er hinvegin ikki gjørligt at hyggja meira yvirskipað eftir, hvør er dømdur.

Sambært § 4, stk. 1 í løgtingslógini kann eftirlitsfelagsskapurin gera samstarvsavtalur við venjingarmiðstøðir og onnur um dopingeftirlit. Ásetingin í § 6, stk. 2 loyvir tí eisini, at eftirlitsfelagsskapurin kann lata upplýsingar úr skránni til eitt nú eina venjingarmiðstøð, um

endamálið er at tryggja, at persónar við dopingdómi ikki stovna seg sum limir í venjingarmiðstøðini, ella at dopingdømdir limir verða útihýstir.

Upplýsingar úr skránni kunnu bert nýtast at handhevja ítróttalig revsiátøk fyri brot á dopingreglurnar, og kunnu tískil ikki útflýggjast til nakað annað endamál.

Í *§ 6, stk. 3* verður ásett, at tey, ið fáast við upplýsingarnar í talgildu skránni, eru umfatað av revsilógarinnar reglum um tagnarskyldu og kunnu revsast, um tey lata upplýsingar úr skránni til óviðkomandi partar.

Av praktiskum ávum kann tað verða neyðugt, at felagsskapurin, ið hevur dopingeftilitið um hendi, samstarvar við onnur um felags talgilda skrá. Ásetingin í *§ 6, stk. 4* loyvir einum slíkum samstarvi, ella at felagsskapurin ger avtalu við líknandi myndugleika ella felagskap í útlandinum um, at føroyski felagsskapurin nýtir teirra skrá. Hetta verður í dag gjørt á tann hátt, at ítróttasambond kring heimin samstarva um felags dopingskrá.

Fyri at tryggja, at ein møgulig samstarvsavtala lýkur føroysku krøvini til m.a. viðgerð av persónsupplýsingum umframt møgulig altjóða krøv, verður ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna avtaluna.

**Til § 7**
Ásetingin umfatar kappingar á “hægri stigi”. Talan er um landskappingar, altjóða kappingar, kappingar, har føroysk landslið taka lut, og kappingar, ið geva atgongd til Oyggjaleikirnar ella Olympisku leikirnar. Hinvegin umfatar ásetingin ikki skúlakappingar, firmakappingar og kappingar í barna- og ungdómsdeildunum fyri ung, ið ikki eru nóg gomul at luttaka í vaksnamannakappingunum.

Ítróttakapping er ein støða, har tveir ella fleiri luttakarar, ella tvey ella fleiri lið kappast í eini ítróttagrein, og at kappingin endar við einum ítøkiligum úrsliti. Ein ítróttagrein er eitt slag av ítrótti, ið hevur ávísar reglur, ið eru serstakar fyri viðkomandi ítrótt.

*§ 7, stk. 1* ger tað revsivert at mutra ítróttafólk ella persón, sum røkir eina uppgávu í sambandi við ítróttakapping, *og § 7, stk. 2* ger tað revsivert hjá ítróttafólki ella persóni, ið røkir eina uppgávu í sambandi við ítróttakapping at taka ímóti mutri. Hugtakið “persónur, ið røkir eina uppgávu í sambandi við ítróttakapping” umfatar øll, ið á ein ella annan hátt eru knýtt at ítøkiligu kappingini á slíkan hátt, at tað er hugsandi, at tey kunnu ávirka úrslitið; tað veri seg dómarar, hjálparfólk, venjarar og persónar, ið sita í leiðsluni í ítróttafeløgum o.o.

Ásetingarnar í § 7, stk. 1 og 2 um mutur eru orðaðar á sama hátt sum ávíkavist *§ 122*, *§ 144 og § 304 a* í revsilógini, ið allar snúgva seg um mutur, og skulu tí tulkast samsvarandi. Felags fyri bæði stk. 1 og stk. 2 er, at tær skulu nýtast í teimum førum, har málið ikki er umfatað av *§ 279* í revsilógini, um fíggjarsvik. (bedrageri)

Í *§ 7, stk. 3* er ásett hægri revsiramma fyri serliga grov brot á *§ 7, stk. 1 og 2*. Uppreksanin í ásetingini er vegleiðandi og avmarkar ikki, hvørji mál kunnu sigast at vera av serliga grovum slag. Ein meting skal gerast, um ítøkiliga brotið er av serliga grovum slag og harvið umfatað av hægru revsirammuni.

**Til § 8**
Áseting um gildiskomu.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, dagfesting.

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen